RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

# TRYGDARBELTI



## GÓÐU FORELDUR

Vit arbeiða í løtuni við ferðslu í flokkinum og hava millum annað um, hvussu umráðandi tað er at nýta trygdarbelti.

### Leikluturin hjá foreldrum

Foreldur hava nógv at siga, tá ið tað snýr seg um ferðslutrygdina hjá børnum. Tað besta, foreldur kunnu gera, er at vera fyrimyndir í ferðsluni og tosa um ferðslu og góðar ferðsluvanar við børnini.

### Trygdarbelti

Trygdarbeltið er undirvísingartilfar frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Næmingarnir tosa millum annað um, hvat tað merkir at vera tryggur í ferðsluni, hvussu týdningarmikið tað er at brúka trygdarbelti, og hvussu tað skal nýtast rætt.

Trygdarbeltið skal vera á økslini og liggja um mjødnina og ikki um búkin. Skráselin skal altíð vera um økslina og ongantíð undir arminum ella fara aftur um bak. Hann skal vera strammur, men hondin skal tó sleppa ímillum.

Sambært lóg skulu børn minni enn 135 cm sita á selapútu ella selapútu við baksmekku.

Trygdarbeltið kann gera av, um vit koma óskalað frá óhappi, ella um vit verða álvarsliga skadd.

Ferðsluundirvísingartilfarið er at finna her: **www.snar.fo/ferdsla**

**Vinarliga**

**Lærarar floksins og Ráðið fyri Ferðslutrygd**